Tilbúgvingarstovnur Føroya
Faroese Emergency Management and Inspection Agency

Tórshavn, 31. mars 2011

**Vanliga bygging umfatar**
Við heimild í Løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a. við seinri broytingum. Hevur Brunaumsjón landsins, núverandi Tilbúgvingarstovnur Føroya umsiti (KBB-99) kunngerð um brunaverju og brunatrygd nr. 45 frá 9. mai 1992, við broytingum í kunngerð nr. 88 frá 9. november 1999.

Í sambandi við brunatrygd í vanligum bygningum er KBB-99 ætlað borgarunum, byggiharrunum og ráðgevarunum at prosjektera og byggja eftir.
KBB-99 er somuleiðis ein svarlisti (facitlisti) hjá kommunala byggimyndugleikanum at fyrisita eftir, í samband við brunatrygd, tá hesir veita byggiloyvir til vanligar bygningar. Kommunan hevur í hesum sambandi eisini skyldu til at yvirhalda kunngerð um kommunala byggimálsviðgerð við heimild í § 4, stk. 4., í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997.

KBB-99, stk. 1.2.-2 sigur; *"Viðvíkjandi bygningsflokkunum, sum eru greinaðir í ásetingunum í III kapittli verða krøvini í 1.2.-1 um brunatrygd vanliga roknað sum lokin, tá bygt og innrættað er sambært tí grein, sum hoyrir til tann ávísa bygningsflokkin."*.

KBB-99, kap. III er avmarkaður til tað vit nevna "vanliga bygging" sí niðanfyri:
- 8. Einbýlishús – sethús, tvíhús, raðhús, randarhús, hús í trunka og tílíkt.
- 9. Íbúðarhús í fleiri hæddum og hús við fleiri enn 2 sjálvstøðugum íbúðum.
- 10. Gistingarhús, hotell, vistarheim, hús við smáíbúðum og tílík virki.
- 11. Sjúkrahús, røktarheim, hvíldarheim, ellisheim og aðrir stovnar við tílíkum endamáli.
- 12. Samkomuhús, leikhús, høli til framsýningar, fundir, skemtunarendamál, ítróttarhallir, matstovur, veitsluhøli, kirkjur og onnur høli og bygningar nýttir til tílík endamál.
- 13. Undirvísingarhøli o.t.
- *14. Dagstovnar, vøggustovur, barnagarðar, frítíðarheim og stovnar til tílík endamál.
- 15. Handlar, sølubúðir og sølubygningar
- 16. Skrivstovuhøli o.t.
- 17. Ídnaðar og goymslubygningar í einari hædd
- 18. Bilahús størri enn 100 m$^2$.
- 19. Landbúnaðarbygningar fjós, løður og tílíkt.

**Omanfyri nevnda er tó ikki galdandi fyri dagstovnar, sambært Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000, Um dagstovnar og dagrøkt. Sí eisini undir undantøk frá vanligari bygging.*

KBB-99, stk. 1.2.-3 sigur víðari; *"Bygningar, sum bygningsflokkingarnar í III kapittli ikki fevna um, skulu, í tann mun tað er sambærligt, lúka krøvini í teimum ávísu greinunum viðvíkjandi vídd á brunaeind, eldvanda, rýmingarviðurskiftum, sløkkingarmøguleikum o.ø."*.

KBB-99, stk. 1.2.-6 sigur greitt hvat kunngerðin er galdandi fyri; *"Ásetingarnar í kunngerðini eru galdandi fyri:*

*1)*

*a. Nýggja bygging.*

*b. Umbygging av/ella bygging afturat húsum.*

*c. Broyting í innrætting ella nýtslu av bygging, sum er, og sum hevði komið undir hesi kunngerð, um hon var nýbygging.*

*d. Byggingar, sum eru, tá ið tær einstøku reglurnar beinleiðis heimila hetta.*

*2)*

*a. Fastar konstruktiónir og virki, sum eftir fyritreytunum í kunngerðini og í trygdarligum høpi, eru at skilja sum bygging.*

*b. Flytandi konstruktiónir, eitt nú tjøld, bátar, vognar ella tílíkt, tá ið nýtsla teirra sum bygging ikki bert er fyribils.*

*c. Tangar, kranar, flutningsbrýr, pallar, áskoðarapallar, skýli og aðrar konstruktiónir, í tann mun tað er náttúrligt, tá ið hugsað verður um almennan tryggleika, skil, heilsu ella onnur viðurskifti, sum kunngerðin er ætlað at røkja.*

*3)*

*a. Byggingar, sum eru, mugu ikki við broyting, um-/ella afturatbygging, hækkan ella á annan hátt verða broyttar, soleiðis at tær stríða ímóti galdandi reglum ella, um so skuldi verið, fara at stríða enn meira ímóti hesum reglum, enn tær longu gera.*

*b. Skulu byggingar, sum eru, verða umvældar ella broyttar so nógv, at øll byggingin yvirhøvur verður endurnýggjað (høvuðsumbygging), skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at byggingin sum mest samsvarar við tær reglur, ið galda fyri nýbygging. Bý- og bygda(r)ráð kunnu gera av, hvat ið metast skal at vera høvuðsumbygging."*.

Omanfyri nevndu bygningar eru av slíkum slag, at borgarin, byggiharrin og ráðgevin skal lata máli inn til avvarðandi kommunu at viðgera. Allar kommunur skulu sjálvar viðgera og avgreiða vanligar bygningar í samband við brunatrygd sambært minstukrøvum í KBB-99. Eru ivamál seti tygum vinarliga í samband við Tilbúgvingarstovn Føroya.